# Føroyska rossið er egið slag

## Leygardagin verður framløga um DNA-kanningar av føroyska rossinum

FØROYSKA ROSSIÐ



*Niðurstøðan í granskingararbeiðinum er, at føroyska rossið er egið slag, og at eingin ábending er um uppíblanding*

Leygardagin 20. august 2005 kl. 17 fer Sofia Mikko, doktari, frá Sveriges lantbruksuniversitet í Uppsala at leggja fram úrslitini av DNA-kanningunum, sum vórðu gjørdar í 2003-04 av Føroyska rossinum. Fundurin er almennur, og verður í húsum Føroya Ríðingarfelags í Havnardali. Framløgan verður á svenskum, og øll áhugað eru vælkomin.

Felagið Føroysk Ross hevur seinnu árini arbeitt við at fáa loyst tvey høvuðsmál:

a) at byggja upp ein ílegugrunn við niðurfrystum rossasáði á Royndarstøðini

b) at fáa gjørt eina DNA kanning og arvafrøðiliga lýsing av stovninum.

Bæði tiltøkini eru fíggjað við stuðli úr Vinnumálaráðnum av játtanini á fíggjarlógini til varðveitslu av gomlu húsdjórasløgunum.

Dr. Sofia Mikko, granskari, ið hevur staðið fyri kanningararbeiðinum, hevði í fjør heyst vísindaliga framløgu av úrslitunum á altjóða ráðstevnu í Tokyo. Hon vitjar í hesum døgum í Føroyum sum gestur hjá Felagnum Føroysk Ross, og fer hon leygardagin 20. august 2005 kl. 17 at hava eina framløgu av granskingarúrslitunum. Niðurstøðan í granskingararbeiðinum er, at føroyska rossið er egið slag, og at eingin ábending er um uppíblanding. Úrslitini eru somikið áhugaverd, at Sofia Mikko og tey ætla at gera fleiri kanningar og at skriva vísindagreinir um evnið.

Í fjør heyst fekk Nordisk Genbank Husdyr (NGH) tilfar um Føroyska rossið frá Gentilfeingisnevndini hjá Vinnumálaráðnum at leggja í teirra dátugrunn, ið er atgongdur á alnótini. Eisini føroyska gásin og føroyska dunnan eru lýst har. Leinkjan til føroyska rossið er: **http://asp.nordgen.org/husdyrdatabase/visrase.asp?id=183**

NGH-dátugrunnurin er eitt týdningarmikið vindeyga út í heimin, og upplýsingarnar har eru at meta sum upplýsingar frá teimum almennu Føroyum. Næsta stigið verður dátugrunnurin hjá ST-stovninum FAO (DAD-IS).

Í 1880-unum var rossastovnurin í Føroyum umleið 800 ross; í 1960-unum, tá varðveitingararbeiðið byrjaði, vóru bert eini 4-5 føroysk ross eftir, og nú er stovnurin íalt gott og væl 40 ross, sigur Felagið Føroysk Ross í tíðindaskrivi.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og regn, seinnapartin upp í ein strúk av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í eins trúk av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 7 og 11 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 14 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 20 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 31 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 15 |
| New York | 24 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 11 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 996 hPa. í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað og dýpist. Brúgvalagið haðani til havið sunnan fyri Føroyar verður yvir Føroyum týskvøldið.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani til havið eystan fyri Føroyar fer eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/8 kl. 06[00]– 16/8. 06[00]. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 15/8 kl. 06[00]– 16/8 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 36,5 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

13. august — Fyrra kvarter
19. august — Fullmáni/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. aug | 05.06 | 17.35 | 04.06 | 16.35 | 04.21 | 16.50 | 07.06 | 19.35 | 08.06 | 20.35 | 03.21 | 15.50 | 02.21 | 14.50 | 05.21 | 17.50 | 06.21 | 18.50 | 04.51 | 17.20 | 06.06 | 18.35 |
| 18. aug | 06.04 | 18.29 | 05.04 | 17.29 | 05.19 | 17.44 | 08.04 | 20.29 | 09.04 | 21.29 | 04.19 | 16.44 | 03.19 | 15.44 | 06.19 | 18.44 | 07.19 | 19.44 | 05.49 | 18.14 | 07.04 | 19.29 |
| 19. aug | 06.54 | 19.22 | 05.54 | 18.22 | 06.09 | 18.37 | 08.54 | 21.22 | 09.54 | 22.22 | 05.09 | 17.37 | 04.09 | 16.37 | 07.09 | 19.37 | 08.09 | 20.37 | 06.39 | 19.07 | 07.54 | 20.22 |
| 20. aug | 07.50 | 20.15 | 06.50 | 19.15 | 07.05 | 19.30 | 09.50 | 22.15 | 10.50 | 23.15 | 06.05 | 18.30 | 05.05 | 17.30 | 08.05 | 20.30 | 09.05 | 21.30 | 07.35 | 20.00 | 08.50 | 21.15 |
| 21. aug | 08.41 | 21.05 | 07.41 | 20.05 | 07.56 | 20.20 | 10.41 | 23.05 | 11.41 | - | 06.56 | 19.20 | 05.56 | 18.20 | 08.56 | 21.20 | 09.56 | 22.20 | 08.26 | 20.50 | 09.41 | 22.05 |

5 707265 100036 >